# DONG vil samstarva við brandskúlan við Áir



*-Vit vilja fegnir hjálpa føroyingum at gera brandskúlan við Áir betri føran fyri at taka ímóti avbjóðingini, sum ein komandi olju- og gassvinna í Føroyum er sigur ein av leiðarunum í donsku DONG-fyritøkuni, sum heldur skeið í Føroyum*

Møguleiki er fyri einum tøttum samstarvi millum brandskúlan við Áir og donsku oljufyritøkuna DONG.

Í sambandi við at DONG hevur leiðsluráðstevnu í Føroyum í hesum døgum vóru nøkur umboð fyri



fyritøkuna eisini á vitjan á brandskúlanum við Áir, har tey skuldu hitta Tórfinn Hentze, leiðara, Eli Davidsen og Paula Einarson, sum báðir eru við í tí arbeiðsbólkinum undir oljuráðleggingarnevndini, sum arbeiða við eitt brandmálum í eini komandi olju- og gassvinnu.

Vitjanin hevur samband við ætlaninar at fara undir oljuvinnu í Føroyum. Og nú DONG eisini er hugað fyri at vera við í leitingini eftir olju og gassi hildu menn tað vera náttúrligt at kanna møguleikan fyri einum samstarvi millum hetta danska felagið og so brandskúlan við Áir.

DONG hevur nevniliga sín egna brandskúla og hava teir drúgvar royndir á hesum øki, tá talan er um olju og gass.

Torben Secher, virkisstjóri hjá DONG sigur, at teir áður hava havt samstarv við føroyska brandskúlan. Hetta var herfyri, tá føroyingar vitjaðu gassviðgerðarstøðina hjá DONG í Nybro uttan fyri Esbjerg. Har hava teir so eisini ein skúla.

-Spurningurin er nú, um vit kunnu hjálpa føroyingum við onkrum á hesum so týðandi øki eitt nú við at vera við til at menna verandi støðina við Áir umframt at skipa fyri eini undirvísingarskrá sigur DONG-stjórin, sum vónar, at føroyingar kunnu fáa nyttu av teimum royndum, sum tey hava gjørt hjá DONG.

jan




**PIZZARIA og SKÁIN**

eru opin hvønn dag
kl. 17–23
Harumframt er SKÁIN opin hvønn leygar- og sunnumorgun
kl. 05–07

**Ringið tlf. 18866**
og fáið vørurnar sendar til hús